Viðmerking:

Eftir 2. umfar

Annar samráðingarfundur Føroya og Danmarkar í-millum staðfesti sannførandi, at samgongan framvegis hevur besta og einasta seriøsa boðið uppá eina framtíðar skipan millum Føroyar og Danmark. Besta prógv um hettar eru reaktiónirnar frá føroysku andstøðuni, sum nú kallar øll framstig fyri afturstig, og av hesi orsøk krevur, at samgongan sigur frá sær fólksins álit í stundini.

Í hesum marghátliga eftirspæli til annað umfar av samráðingunum, er tað serliga reaktiónin frá Javnaðarflokkinum, ið hevur fangað mín áhuga, tí hon so ómetaliga beinrakið avdúkar, hvat tað er, sum forðar hesum flokki, og lutvíst Sambandsflokkinum, at taka á seg ábyrgd fyri egnum landi. Veljarakanningin, sum varð gjørd herfyri, vísti hesar somu tendensir.

Skammleysur løgmaður

Løgmaður var enn ikki heimaftur komin av fundi við donsku stjórnina, tá hann frá formanni Javnaðarfloksins fekk at vita, at hann átti at skamma seg, soleiðis at taka politiskar avgerðir vegna Føroyar og komandi ættarlið, uttan at spyrja nakran (les: Javnaðarflokkin) um loyvi. Í somu vending spurdi hann hvat tað er, sum ger løgmann so einastandandi, at hann einsamallur (les: uttan Javnaðarflokkin) ætlar avgera lagnu føroyinga. Nei, løgmaður átti at skamma seg, helt formaður Javnaðarfloksins. Undirskilt er, hvussu lágt Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin figurera í hugaheimi Javnaðarformansins.

Men hettar við at politikarar taka avgerðir, sum ávirka samfelløg í fleiri ættarlið, er ikki nakað nýtt. Hettar er sjálv kjarnin í politikki. Hettar varð eisini gjørt í 1946 og ikki minst í 80'unum. Tað er spell, at andstøðan er vorðin so fordjúpað í egnum trongskygni, at hon ikki enn hevur uppdaga hvussu stóran týdning tað hevur, at vit ikki endurtaka somu mistøk. Í 1946 vórðu avgerðir tiknar, sum raktu seinni ættarlið, ikki minst okkum núlivandi, og sum tók øll seinni ættarlið til gíslar í einum tjóðskaparligum klandri og sundurlyndi, sum hevur forðað okkum í einari veruligari menning av egnum politiskum og búskaparligum skipanum.

Í 1946 varð fórt fram, at føroyska samfelagið var ikki búgvið til fullveldi. Vit vita í dag, at Føroya Fólkið var búgvið, men politisku leiðarar landsins vóru ikki búnir til at taka á seg neyðugu ábyrgdina, og tí datt alt niðurfyri. Til stóran skaða fyri menningina av einum sjálvstøðugum Føroyum, og til stóran ampa fyri allan framburð, serliga á politiska og búskaparliga økinum. Hesir leiðarar tordu ikki at taka neyðugu stigini til tess at føroyingar kundu yvirtaka ábyrgdina fyri sær sjálvum og egnum landi, og avleiðingarnar av hesi skeivu avgerð teirra kulmineraðu við kreppuni fyrst í 90'unum, tá manglandi ábyrgdarkensla føroyinga í fullum blóma varð sýnd fram á almennari framsýning í útlendskum og serstakliga donskum fjølmiðlum.

Hettar er tað, sum hendir, tá politiskir leiðarar ikki tora at liva upp til tað álit, teimum er litið. Hettar er tað, sum Javnaðarflokkurin, sambært formanni floksins, vil hava, at vit royna einaferð afturat. Aftur skulu vit til at fortelja børnum okkara, at vit ikki, eins og aðrar frælsar tjóðir, hava fult ræði á okkara landi og okkara samfelag, og at vit tí ikki kunnu samstarva á jøvnum føti við aðrar tjóðir. Og at tey, hóast tey tosa føroyskt, eta føroyskan mat og búgva í Føroyum, eru danskir ríkisborgarar, og einans standa til svars yvirfyri donsku grundlógini og danska dómsvaldinum. Og so annars fáa tey at skilja, at við myndugleika fylgir ábyrgd. Løgmaður ynskir ikki at endurtaka hesi mistøk, og tí eigur hann at skamma seg, sambært formanni Javnaðarfloksins.

Vit vita, at í árinum 2000 eru bæði Fólk og politiski myndugleiki búgvin til at taka á seg ábyrgdina fyri sær sjálvum, og í dag siga vit, at vit vilja ikki taka okkara eftirkomarar til gíslar, soleiðis sum okkara ommur, abbar og foreldur, og seinni vit sjálvi, vórðu tikin til gíslar í 1946, men heldur tvørtur í-móti geva teimum komandi ættarliðunum møguleika at viðgera viðurskifti, sum viðkoma føroyingum, innanríkis- sum uttanríkspolitikk, í tí álvara, ið sømir seg, og uttan áhaldandi grenj og klandur um samband ella loysing. Vit vilja ikki lata eftirkomarar okkara arva okkara sundurlyndi og hettar óyndandi stríð, sum hevur býtt tjóðina sundur alt ov leingi. Tí mugu vit standa saman um at taka avgerðina nú, saman við okkara fólkavalda politiska myndugleika.

Andstøðan onki boð

Hvørki føroyska andstøðan ella danska stjórnin hava latið við seg koma, táið samgongan hevur sóknast eftir konstruktivum viðmerkingum, ella í minsta lagið onkrum líkinda alternativi til samgonguuppskotið, nú andstøðan leikar soleiðis í. Tað átti heldur ikki at verið ov nógv at forlanga av teimum, at táið teir soleiðis kunnu sita frammanfyri Føroya Fólki og sápla niður alt tað framúr væl úr hondum greidda forarbeiðið, sum er gjørt í sambandi við fullveldissamráðingarnar, skíra tað óseriøst, nationalromantiskt og rabiat, ja, onkur hevur enntá kallað tað fascistiskt, so áttu hesi somu at kunna víst á onkra aðra gongda leið, men nei. Tað ber ikki til.

Spyr tú ein javnaðar- ella sambandstinglim, hvat vit føroyingar skulu gera, táið vit fáa størri sjálvstýri og blokkurin tá minkar (samsvarandi teirra egnu uppskotum og útsagnum Nyrups), tá er standardsvarið: „tað eru ikki vit,ið vilja loysa; tað eru tit, og tí eru tað tit, sum skulu siga hvat tit ætla." Sum íkast til sjálvstýriskjakið er hettar jú fullkomuliga ónýtiligt. Tí er tað eisini hópin lættari nú at skilja, hví semja ikki kundi fáast í lag millum samgonguna og Javnaðarflokkin, tá teir sokallaðu kaffifundirnir vórðu hildnir. Har er jú onki at semjast um. Javnaðarflokkurin hevði læst seg fastan longu frammanundan, so hesir kaffifundir vóru frá teirra sjónarhorni bert eitt spæl fyri gallarínum.

Tað løgna er, at danska stjórnin sigur júst tað sama sum føroyska andstøðan. Danska stjórnin tekur heldur ikki undir við ætlanunum hjá samgonguni, men hevur heldur onki boð uppá aðrar skipanir ella aðrar ætlanir at taka støðu til. Við øðrum orðum eru vit í einari støðu, har føroyska andstøðan saman við donsku stjórnini øðrumegin gartera og leika í, kalla løgmann skammleysan, samgonguna í ørviti, og landsstýrismannin í sjálvstýrismálum propagandachef, og hinumegin samgonguna, sum vil lurta eftir og fáa góð ráð frá andstøðuni, til tess at skapa eitt breiðari grundarlag fyri semju. Men tá vendir andstøðan ryggin til og grettir ikki orð. Tá er tað knappiliga ikki teirra borð, at siga hvat vit skulu. Tað hevur samgongan jú patent uppá, sigur andstøðan.

Tá hettar alt verður havt í huga, er tað kortini ikki so løgið at andstøðan ikki fegnast um at tað gongur væl hjá samgonguni at vinna Føroyum tjóðarfrælsi, tí tað tykist vera teirra lutur, ella lagna um ein vil, at virka undir danskari yvirvøld. Tað er eyðvitað stórur ivi um framtíðina hjá hesum báðum flokkum, Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, í fullveldinum Føroyar, og tað er teirra marrudreymur.

Kanningin greið tala

Eins og Edmund Joensen, so haldi eg, at kanningin, sum varð gjørd herfyri, vísti púra greitt, hvat føroyingar vilja. Tað er bara tann munurin, at Edmund tulkar úrslitið beint øvugt av úrslitinum. Sambært kanningini ynskja 60-70% fullveldi, um skiftistíðin bara er nóg long. Hettar eru nógv fleiri enn nakrantíð fyrr. Men Edmund Joensen heldur, at samgongan eigur at leggja frá sær.

Standardviðmerkingin hjá formanni Sambandsfloksins til allar veljarakanningar, sum hava verið síðani hendan samgongan varð skipað, umframt teir báðar samráðingarfundirnar, sum hava verið, er, at nú má samgongan taka avleiðingarnar og leggja frá sær í stundini. Tess størri undirtøku samgongan hevur, tess meira átroðkandi er tað sambært Edmundi Joensen, at hon leggur frá sær.

Seinasta veljarakanning sýndi, at tað framvegis er ein meiriluti av Føroya Fólki, ið tekur undir við politikkinum hjá samgonguni og føroyskum fullveldi, hóast bæði fjølmiðlar, andstøðan og Óli P. seinastu tvey árini hava rikið eina eirindaleysa og perfida ræðuherferð móti fullveldispolitikkinum og hugsjónarligu undangongumonnunum í føroyskum politikki. Hendan herferð hevur verið so massiv og dominerandi, at tað næstan ikki hevur verið pláss til at viðgera onnur týðandi samfelagsmál í álvara. Ábyrgdina fyri hesum mugu fyrst og fremst fjølmiðlarnir taka á seg, men spurningurin er, um ikki andstøðan eisini eigur at viðurkenna sín leiklut, taka á seg sína ábyrgd, so ella so. Tað er í øllum førum óheppið fyri okkara sjálvsvirðing og áræði, at fólkavaldir politikarar og fjølmiðlar nýta so nógva orku uppá at niðurbróta trúnna uppá egnan mátt og megi, heldur enn at stuðla við konstruktivum hugskotum og vilja til at loysa samfelagslig stórmál.

Virðilig umboð fyri land okkara

Vit hava ein stinnan og dugnaligan løgmann, sum dugir at seta seg sjálvan í respekt, og sum hevur stórt álit í fólkinum. Hartil hava vit ein diplomatiskan og lærdan varaløgmann, sum eisini er landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, og sum fyri kortum varð róstur sum ‚problemknúsari' av forkvinnuni í Føroya Lærarafelag. Og saman við teimum berjast vit fyri at vinna Føroya Fólki heimsins mest grundleggjandi rættindi, nevniliga full tjóðskaparligt frælsi og fólkaræði. Allar ræðumyndir og mytur, andstøðan hevur bygt upp kring hugtakið ‚fullveldi', eru afturvístar og punkteraðar, og tí fari eg at enda við einari áheitan á andstøðuna, annahvørt at saðla um nú, ella rætt og slætt at leggja frá sær. Tað er ikki rætt av fólkavaldum politikarum at brúka alla sína orku uppá at fortelja føroyingum, hvussu lítið vit duga og hvussu lítið vit megna. Tí er tað í veruleikanum andstøðan, sum átti at skammast.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð

Viðmerkingar til grein hjá Arnbirni Ó. Dalsgarð

At tú Arnbjørn Ó. Dalsgarð er fullveldismaður og eg ikki, tað er bert ein veruleiki, sum vit báðir hvør í sínum lagi mugu liva við. Eg ætli mær ikki at brúka tíð og kreftir upp á at sannføra teg um, at tað er ein skeiv kós, sum tú og onnur fullveldisfólk ganga, og eg haldi ikki, at tú eigur at brúka stórvegis av tíð og kreftum til tað mótsatta.

Tað er ein partur av demokratinum, at vit hava loyvi til at hava hvør sína støðu.

Men tað eru tó tvey viðurskifti í samband við seinna samráðingafundin millum landsstýrið og donsku stjórnina, sum eisini grein tín við heitinum "Eftir annað umfar"partvís snýr seg um, sum gera, at eg má koma við einari rættleiðing og einari viðmerking.

Fyri tað fyrsta hetta, at vit í dag møguliga skulu taka eina avgerð bæði á løgtingi og við eina fólkaatkvøðu um tað, sum skal henda um kanska 15 til 20 ár. Løgmaður nevndi á tíðindafundinum møguleikan fyri at útsetaígildiskomanina av fullveldinum, og tað var í samband við júst hetta, at eg gjørdi mína viðmerking.

Sjálvandi fáa politiskar avgerðir altíð fylgjur fyri eftirtíðina, tað kunnu vit ikki verða ósamdir um. Men harfrá og so til at taka pant í einari tíð, sum møguliga ikki er okkara egna, er skeivt. Politikkarar, sum taka eina avgerð, skulu sjálvir merkja konsekvensin. Hvat líkist tað, at løgtingið, sum nú situr, og fólkið, sum nú livir, skal taka eina avgerð, sum fyrst og fremst okkara eftirkomarar skula merkja.Eg haldi beinleiðis, at tað er ósømiligt at gera slíkt. Og hvat -er tað, sum ger okkum inclusivt løgmann so einastandandi, at tað eru vit, sum skulu taka hesa avgerðina. Eru okkara førleikar so avbera góðir, at eingin í eftirtíðini kann metast javnt við okkum?

Og hvat eru løgmaður og Jóannes Eidesgaard um 15 til 20 ár. Jú, um vit liva, so eru vit tveir fittir pensjonistar. Hví skulu vit ikki hava so frægt álit á okkara børnum og abbabørnum, at tey ikki duga at taka røttu avgerðirnar til ta tíð?

Tað var henda vinkulin, sum eg fanst at eftir seinna samráðingarumfarið. Tað er ikki nakað eg meini, tí eg sisti í andstøðu, men tað er nakað innast í mær sjálvum, sum sigur, at vit ikki skulu taka avgerðir fyri okkara eftirkomarar. Og eg havi so ótrúliga stórt álit á okkara eftirkomarum. Tey eru sanniliga før fyri at taka avgerðir, bæði stórar og smáar.

Hitt var viðvíkjandi Nato og Friendship for Peace.

Eg má siga sum er, at eg hvakk ikki sørt við, tá eg seint á kvøldi 2. mei fekk eitt fax, sum segði, at landsstýrið umhugsaði limaskap í hesum felagsskapi undir Nato. Sum løgtingsmaður, sum floksformaðar, sum limur í løgtingsins uttanlandsnevnd og sum føroyingur vildi eg hildið, at eg átti at vitað hetta, áðrenn Nyrup, Lykketoft og Jelved vórðu kunnaði um hesar ætlanirnar hjá landsstýrinum.

Hetta var nýtt fyri meg og væl saktans fyri alt Føroya fólk. At landsstýrið hevði tikið støðu fyri Nato, visti eg ikki, og at Tjóðveldisflokkurin, sum ein nú fyrrverandi inkarneraður mótstandari av Nato hevði skift støðu — tað vóru tíðindi, sum fyrst og fremst festu í í Føroyum.

Ikki kundi eg heldur lata vera við at minna á, at Føroya Løgting fleiri ferðir síðan apríl 1940 hevur samtykt at standa óheft av øllum verjuskipanum eisini Nato. So sanniliga vóru hetta stórtíðindir, sum eg dittaði mær at hava viðmerkingar til.

Tað kann væl vera, at tú Arnbjørn Ó Dalsgarð heldur meg vera eitt gamal grenj, tá tað snýr seg um fullveldið, men eg má minna teg á, at er ikki frægari stirðil í tykkum fullveldismonnum, at tit ikki tola atfinngarsomu røddina frá andstøðuni, so hava tit tapt áðrenn dysturin er byrjaður.

Múrurin er fallin — andstøðan skal eisini hava orðið.

Jóannes Eidesgaard

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

ÍtróttaSosialin

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Skáli kom á listan

3. deild: Øll liðini hava nú fingið stig, og B36 hevur framvegis fult stigatal

Støðutalvan, eftir at fýra umfør eru farin afturum, boðar frá, at kappingin kann fara at gerast javnari í ár, enn hon so ofta áður hevur verið. Í hvussu so er tykist tað ikki sum at nakað upplagt evni til niðasta plássið av álvara hevur givið seg til kennar higartil. Undanfarin ár hevur tað ofta verið soleiðis, at aftasta plássið so at siga hevur verið bílagt beinanvegin!

Undantakið frá øllum hinum liðunum hevur higartil verið B36. Gongdin hjá teimum er meinlík henni hjá besta liðnum. Teir í árstalsfelagnum hava kveistrað alla mótstøðu til síðis. B36 hevur eitt gott lið. Góða gongdin hjá besta liðnum ger, at teir á 3. deildarliðnum tít og ofta fáa onkrar av eykamonnunum hjá 1. deildarliðnum at hjálpa sær, og tað styrkir øgiliga væl um.

Vit hava í farnu vikunum staðfest, at Skáli so at siga hevur verið í dvala. Teir hava verið aftastir, og VB var undan vikuskiftinum næstaftast. Botnliðini hittust á Vágs eiði, og Skáli vann síni fyrstu stig. Vit skilja á lagnum, at tað verður roknað við, at stigaposin á Skála fer at tyngjast uppaftur meiri tær næstu vikurnar.

Til dystirnar í teimum fyrstu umførunum vóru teir á Skála hálvavegna noyddir at biðja fólk, tí tað møttu so fáir upp at venja. Nú er betri vorðið, og tey fyrru kvøldini í hesi vikuni vóru teir upp ímóti tjúgu til venjing. Onkrir, sum hava verið skaddir, eru komnir fyri seg aftur, og onkrir, sum eru skipsmenn, eru komnir heim og steðga kanska einar tveir mánaðir. Alt hetta hevur við sær, at tað eisini verður hugaligari at venja hjá teimum, sum higartil hava saknað nógv fólk.

FS Vágar og AB spældu ikki í Vágum. Orsaka av syndarligu bilvanlukkuni sunnumorgunin varð allur fótbóltur avlýstur, sum skuldi vera í Vágum síðsta sunnudag. Vit skilja á lagnum, at ætlanin er, at FS Vágar og AB komandi sunnudag skulu spæla útsetta dystin frá fjórða umfarinum. Tað vil við øðrum orðum siga, at sunndagin tekur AB ímóti VB, og FS Vágar skal suður á Tvøroyri, og so hittast FS Vágar og AB tveir dagar seinni. Tá hava øll hini liðini í deildini frídag.

B68–B71

Toftamenn eru so smátt farnir at ota seg fram móti tí plássinum, sum tað undan kappingarbyrjan var sannlíkt, at teir fóru at vera í nánd av. Á B71 liðnum var Ib Mohr Olsen veteranurin, sum hevði nógvar ungar menn rundanum seg. Einki at ivast í, at fleiri teirra komandi árini fara at spæla í 1. deild.

Hjá B68 vóru einstakir ungir menn, t.d. Kristian Poulsen, sum hevur verið skaddur, men sum nú tykist vera komin fyri seg aftur. Men hjá B68 vóru eisini fleiri veteranar. Ein teirra var Jóannes Jakobsen, sum fyrstu 78 minuttirnar var á miðvøllinum og skoraði tvey mál. Ein annar var Aksel Højgaard, sum varð skiftur inn í 71. minutti, og sum skoraði bæði í 80. og 85. minutti. Og ein triðji superveteranur a B68 liðnum var Ingolf Petersen. Hann hevur ikki verið so nógv at hoyrt til í fleiri ár. Men nú er hann aftur á klettunum, og sunnudagin spældi hann teir síðstu tólv minuttirnar.

B36–TB

Talan var um ein rættuliga spennandi dyst. Gestirnir fylgdu leingi væl við. TB kom tvær ferðir á odda, men teir í B36 vóru drúgvari. Tvær ferðir megnaðu teir at koma afturíaftur, og tá tað restaði eitt korter, skoraði liðformaðurin, Regin Arge, sigursmálið.

Merkisvert var annars, at málverjin á besta hondbóltsliðnum hjá Neistanum, Petur Magnusson, hesa ferð vardi málið hjá B36 í 3. deild. Tað var eisini merkisvert, at Allan Manai í 2. hálvleiki varð skiftur inn á B36 liðið. Fyri tveimum árum síðani var hann fleiri ferðir á besta liðnum hjá B36. Í fjør helt hann frí frá fótbólti, og fyrsta partin av hesum kappingarárinum hevur hann spælt í 4. deild. Men nú kom hann altso inn á 3. deildarliðið, og so er spurningurin, um vongverjin ella miðvallarin ætlar at gera meiri við venjingina.

ÍF–KÍ

Klaksvíkingar høvdu Allan Joensen í álopinum. Sera evnaríki maðurin, sum miðskeiðis í níti árinum spældi fleiri ferðir á landsliðnum, hevur ikki fingið spælt fótbólt í næstan tvey ár. Og sjálvt um hann hesa ferð hjálpti illa mannaðu liðfeløgunum við so at siga at standa frammarlaga á øllinum, so røkist einki fyri, at Allan Joensen fær førleikan av álvara at fara aftur at yenja.

ÍF hevði fleiri ungar og evnaríkar menn á liðnum, men hóast teir høvdu yvirvág alla tíðina, so kom hol ikki á fyrrenn eftir steðgin.

Ein nýggjur Lakjumaður skoraði tvey tey fyrstu málini. 16 ára gamli vinstrabeinti miðvallarin, Leivur á Lakjuni, sett hol á við fínum fríspark, og hann økti til 2–0, tá hann var fyrstur á, eftir at málverjin hevði hálvbjargað.

Ein annar av ungu og evnaríku monnunum, 16 ára gamli Hanus Eliasen, sum var innskiftur seint í 1. hálvleiki, økti til 3–0 eftir gott skift í høgru. Klaksvíkingar settu nógvar rangstøðufellur, sum riggaðu væl. Men tá tað restaðu tíggju minuttir kiksaði ein, og tað gjørdi vongverjin, Sigfríður Abrahamsen, sær dælt av.

Bogi Isaksen lobbaði upp um málverjan, tá hann pyntaði um fyri KÍ. Innleggið var komið úr vinstru.

VB–Skáli

Endiliga eydnaðist tað hjá Skála.

Superveteranurin, Egil Steintórsson, setti hol á fyri heimaliðið eftir innlegg og verjudrál, men tað varð skjott greitt, at tað fór at bera á hitt borðið. Skáli hevði mest spælið og flestar møguleikar.

Pauli Hansen góður tilrættisleggjari á miðvøllinum, og hann stútaði til 1-1 eftir horna. Uppskriftin var tann sama, álopsmaðurin, Ólavur Klein Olsen, levði gestirnar framum.

Miðvallarin, Marius Joensen, var blankur, tá hann økti til 3-1, og málskjúttin spældi høgra vongverja, Arnhold Berg leysan, so hesin kundi økja til 4-1.

Álopsmaðurin, Jón Rasmussen, hevði misnýtt brotsspark, tá støðan var 2-1, men hann sveik ikki, tá Pauli Hansen lyfti upp um VB verjuna. Síðsta skálamálið skoraði Ólavur Klein Olsen eftir innlegg úr høgru frá Arnhold Berg.

Gestirnir vóru allir grammir eftir at skjóta enn fleiri mál, og so stóð Egil Steintórsson leysur í hinum endanum, so hann kundi pynta um úrslitið fyri vertirnar.

Úrslit
4. umfar
FS Vágar–AB útsettur

B68–B71 7–3 (1–0)
1–0: Jákup Djurhuus 10.
2–0: Kristian Poulsen 48.
2–1: Kristoffur Vidtfeldt 51.
3–1: Jóannes Jakobsen br 54.
4–1: Bogi Petersen 58.
4–2: Mourits Mohr Viderø 74.
5–2: Jóannes Jakobsen 76.
6–2: Aksel Højgaard 80.
7–2: Aksel Højgaard 85.
7–3: Rúni Joensen 89.

B36–TB 3–2 (1–1)
0–1: Kaj Roest 34.
1–1: Bjarki Sørensen 40.
1–2: Jan Albinus 60.
2–2: Petur Martin Johansen 63.
3–2: Regin Arge

ÍF–KÍ 4–1 (0–0)
1–0: Leivur á Lakjuni 54.
2–0: Leivur á Lakjuni 62.
3–0: Hanus Eliasen 70.
4–0: Sigfríður Abrahamsen 80.
4–1: Bogi Isaksen 86.

VB–Skáli 2-6 (1-2)
1-0: Egil Steintórsson
1-1: Pauli Hansen
1-2: Ólavur Klein Olsen
1-3: Marius Joensen
1-4: Arnhold Berg
1-5: Jón Rasmussen
1-6: Ólavur Klein Olsen
2-6: Egil Steintórsson

5. umfar
fríggjadagin – dýra biðjudag
TB–FS Vágar
KÍ–B68
B71–B36
Skáli–ÍF
AB–VB

sunnudagin
FS Vágar–AB (útsettur frá 4. umfari)

Støðan, 3. deild menn

		dystir	v	-	j	-	vunnin t	tapt mál	mál-munur	stig
1	B36	4	4	-	0	-	0	18	4	14	12
2	B68	4	2	-	1	-	1	14	10	4	7
3	AB	3	2	-	0	-	1	17	5	12	6
4	ÍF	4	2	-	0	-	2	11	12	-1	6
5	B71	4	2	-	0	-	2	10	13	-3	6
6	KÍ	4	2	-	0	-	2	11	19	-8	6
7	TB	4	1	-	1	-	2	13	14	-1	4
8	FS Vágar	3	1	-	0	-	2	6	8	-2	3
9	Skála	4	1	-	0	-	3	8	13	-5	3
10	VB	4	1	-	0	-		3	10	20	-103

Máltindurin

Signar Johannesen	AB	5
Dánial Petur Johansen	B36	4
Aksel Johannesen	KÍ	4
Egil Steintórsson	VB	4
Regin Arge	B36	3
Vinjard Guttesen	B36	3
Jóannes Jakobsen	B68	3
Kristoffur Vidtfeldt	B71	3
Jákup Baldvonsson	ÍF	3
Just Johannesen	TB	3
Bárður Johannesen	AB	2
Fróði Stenberg	AB	2
Svend Poulsen	AB	2
Tumas Eli Hansen	B36	2
Aksel Højgaard	B68	2
Arnfinn Olsen	B68	2
Bogi Petersen	B68	2
Kristian Poulsen	B68	2
Magnus Simonsen	FS Vágar	2
Petur Niclasen	FS Vágar	2
Leivur á Lakjuni	ÍF	2
Bogi Isaksen	KÍ	2
Bogi Gregersen	Skála	2
Ólavur Klein Olsen	Skála	2
Eyðun Svalbard	TB	2
Kaj Roest	TB	2
Niels Gunnar Petersen	TB	2
Hans A. Niclasen	VB	2
Kári í Lágabø	VB	2